UTTAN ÚR HEIMI

## Hvar er hann?

Danska løgreglan situr púra á berum, eftir at fyrrverandi irakski herovastin, Nazae al-Khazaraji, hvarv úr húsavarðhaldi sínum í Sorø seinasta vikuskiftið.

Donsku myndugleikarnir hava leingi kannað skuldsetingar ímóti fyrrverandi generalinum, tí kurdar vilja vera við, at hann stóð á odda fyri irakskum hermonnum, sum nýttu eiturgass ímóti kurdum har norðuri í Irak fyri 15 árum síðani. Fleiri hundraðtúsund fólk doyðu.

Danska løgreglan sigur, at fyrrverandi herovastin var við hús seinasta leygardag, og at kona hansara váttaði sunnudagin, at alt var í lagi. Tá løgreglan seinni kom á dyrnar, var herovastin horvin, og síðani hevur eingin borið eygað við hann. Kurdar í Danmark ivast ikki í, at Nazar al-Kharazaji er farin til Turkalands, har hann er saman við umboðum fyri iraksku andstøðuna, men skyldfólk hansara í Danmark halda, at agentar hjá iraksku myndugleikunum hava burturflutt hann.

Danski løgmálaráðharrin, Lene Espersen, hevur verið fyri hvøssum atfinningum, síðani tað frættist, at fyrrverandi herovastin var horvin úr húsavarðhaldinum.

## 30.000 flýddir

Vesturlendskar fregnartænastur vilja vera við, at umleið 30.000 irakskir hermenn eru rýmdir úr herinum, tí teir vilja ikki verja Saddam Hussein ímóti einum amerikanskum álopi.

Ein talsmaður hjá bretsku herleiðsluni sigur, at nógvir irakskir hermenn eru ræddir, tí teir vita, at irakski herurin hevur ongar møguleikar at standa seg ímóti teimum væl útgjørdu amerikansku og bretsku hermonnunum, sum eru í Kuwait, og sum bert bíða eftir boðum um at leypa á Irak. Hinvegin er einki, sum bendir á, at nakar er rýmdur úr tjóðarhirðini, sum er nógv tann sterkasti parturin av iraksku herinum.

The Times skrivaði mánadagin, at nakrir irakskir hermenn vóru komnir til eina bretska herdeild á kuwaitiska markinum, har teir ætlaðu at geva seg yvir, men at hermenninir fingu boð um at venda aftur. Teir kundu koma aftur seinni, vóru boðini sambært The Times.

## Royna aftur

Í gjár settust umboð fyri teir stríðandi partarnar í Sri Lanka við samráðingarborðið fyri at finna eina friðarliga loysn á ósemjuni millum myndugleikarnar í Colombo og teir tamilsku uppreistrarmenninar har norðuri í landinum.

Samráðingarnar hesaferð eru í Tokyo, og japanska stjórnin hevur lovað pørtunum munandi fíggjarligan stuðul, kunnu teir semjast um frið. Noreg hevur havt ein virknan lut í friðarroyndunum í Sri Lanka, og eisini hesaferð er Noreg umboðað við samráðingarborðið.

Stríðið millum stjórnina og teir tamilsku uppreistrarmenninar hevur vart við í 30 ár, og hildið verður, at meiri enn 60.000 fólk eru deyð í bardøgum hesi árini.

## Flokkur bannaður

Hægstirættur í Spania hevur bannað einum tjóðskaparsinnaðum baskiskum flokki at virka, tí illgruni er um, at flokkurin hevur tætt tilknýti til tann víðgongda baskiska loysingarfelagsskapin ETA.

Spanska stjórnin gjørdi fyri einum hálvum ári síðani av at biðja hægstarætt banna flokkinum Batsuna at virka, og teir 16 dómararnir vóru samdir í avgerðini.

Á valinum í Spania í 2001 fekk Batasuna 10 prosent av atkvøðunum í tí baskiska landspartinum har norðuri í landinum. Flokkurin hevur alla tíðina avsannað, at hann hevur samband við ETA, men flokkurin hevur sýtt fyri at fordøma ta harðrendu framferðina hjá loysingarfelagsskapinum.

# Kríggið kann byrja í nátt



*-Tað er skylda mín sum ovasti fyri amerikansku hermegini at beina fyri tí, sum er ein hóttan ímóti landi okkara, segði Bush í røðuni*

**Eru Saddam Hussein og synir hansara ikki farnir úr Irak klokkan eitt í nátt, verður kríggj.**

KRÍGSHÓTTAN
*Árni Joensen:*

- ST hevur ikki megnað at halda sínar skyldur. Tí noyðast vit at taka málið í egnar hendur.

Tað segði George W. Bush, forseti, tá hann gjáranáttina gjørdi støðuna upp og boðaði frá, at irakski leiðarin, Saddam Hussein, fær ein seinasta møguleika at sleppa undan kríggi.

- Fara Saddam Hussein og hansara seks synir ikki úr Irak innan 48 tímar, verður kríggj, segði Bush. Tá var klokkan farin av eitt okkara tíð, og tískil rennur freistin út klokkan eitt í nátt okkara tíð.

Bush segði, at allar royndir síðani Flógvakríggið í 1991 hava víst, at tað nyttar einki at tosa við Saddam Hussein, tí hann ger ikki tað, sum altjóða samfelagið áleggur honum at gera. Forsetin segði eisini, at teir seinastu fýra mánaðarnar hava USA og onnur lond roynt at loysa Irak-málið á friðarligan hátt, men at tað letur seg ikki gera. Tí er einki annað í at velja enn at nýta hermegi, segði Bush.

Bush tók uppaftur, at Irak er ein hóttan ímóti sínum grannalondum, og at vandi er fyri, at yvirgangsmenn kunnu fáa hópoyðingarvápn úr Irak, og at teir seinni kunnu nýta tey í atsóknum at USA og øðrum londum.

- Tað hevði verið sjálvmorð at latið yvirgangsmenninar søkt at fyrst. Tí mugu vit til verka, segði Bush.

Hann gjørdi eisini eina roynd at vissa irakska fólkið um, at álopið er ikki vent ímóti teimum, men einans einaræðinum hjá Saddam Hussein. Hann mælti iraksku hermonnunum til at leggja vápnini heldur enn at berjast fyri eitt stýri, sum stendur fyri falli kortini.

Bush segði ikki, nær álopið byrjar, fara Saddam Hussein og synir hansara ikki úr Irak innan ta ásettu freistina, men hildið verður, at álopið kann byrja í teimum fyrstu tímunum aftaná t.v.s. í nátt.

# Fyri og ímóti kríggi

**Røðan hjá Bush, forseta fekk ymiska móttøku frá øðrum leiðarum.**

KRÍGSHÓTTAN
*Árni Joensen:*

Ikki óvæntað var franski forsetin, Jacques Chirac, millum tey fyrstu at gera viðmerkingar til røðuna hjá George W. Bush.

Chirac, sum hevur verið tann harðasti mótstøðumaðurin ímóti amerikansku álopsætlanini, segði í sínari viðmerking, at USA átekur sær eina ógvuliga stóra ábyrgd við at fara í kríggj við annað land uttan góðkenning frá ST-trygdarráðnum. Hann vísti samstundis á, at meginparturin av altjóða samfelagnum er ímóti amerikansku ætlanini.

Kina tekur heldur ikki undir við ætlanini hjá Bush-stjórnini. Nývaldi kinesiski forsætisráðharrin, Wien Jiabao, segði stutt eftir røðuna hjá Bush, at tað ber framvegis til at loysa kreppuna á friðarligan hátt, og at hetta eigur at verða roynt.

Hinvegin segði japanski forsætisráðharrin, Junishiro Koizumi, at hann styðjar Bush og ætlan hansara. Koizumi segði, at Bush gera tað rætta. Meiningakanningar í Japan hava kortini víst, at ein stórur meiriluti av fólkinum hevur ikki somu áskoðan sum forsætisráðharrin.

Avstralia tekur eisini undir við USA. John Howard, forsætisráðharri sigur, at Avstralia hevur áhuga í álopinum á Irak, tí tað tænir eisini avstralsku trygdini. Avstralia hevur sent hermenn til Persaflógvan at taka lut í álopinum á Irak.

Størsta muslimska landið í heiminum, Indonesia, er ímóti álopi á Irak. Stjórnin har segði í gjár, at USA hevur ongan rætt at leypa á Irak uttan góðkenning frá ST.





*Ketty á Fríðriksmørk*

# Ketty sýnir fram list á Strondum

**- Hugskotið at hava eina málningaframsýning á Strondum talaði til mín. Kundi tiltakið eggjað øðrum ungum málarum at sýna fram hesumegin fjørðin – ella bara verða ein íblástur og spíri til at fara at mála - hevði tað verið gott, sigur Ketty á Fríðriksmørk**

LIST
*Vilmund Jacobsen*

**Strendur:** Í døgunum, 17. mars til 1. apríl, er Føroya Banki á Strondum fyri fyrstu ferð karmur um eina málningaframsýning. Listakvinnan er 39 ára gamla, Ketty á Fríðriksmørk.

Á framsýningini hevur hon 15 acryl-málningar, sum flestu eru rættiliga nýggir. Málningarnir eru bæði stórir og smáir, og allir eru í rammu. Motivini eru av Strondum.

Ketty dámar væl at mála fjøruna, neystini, hamrarnar og fjøllini, sum stinga seg upp. Henni dámar væl at spæla við litir, og tí eru eisini nakrir abstraktir málningar við hesaferð.

Framsýningin í Føroya Banka er opin hvønn yrkadag frá kl. 12-16, undantikið hósdag; tá er opið frá kl. 12-18.

Allir málningarnir eru til sølu. Prísirnir liggja millum 1.200 og 2.500 krónur.

### Ketty er kreativ

Hetta er fyrstu ferð, at Ketty er einsamøll á eini framsýning við sínum málningum. Hon var við á framsýning á ólavsøku í fjør, og síðan hevur hon verið við á afturvendandi Lions-framsýningini í Runavíkar skúla eini trý fylgjandi ár.

Á ólavsøku seldi hon allar málningarnar, hon hevði við sær og longu mánadagin, tá ið framsýningin læt upp á Strondum, seldi hon eisini nakrar málningar.

Ketty hevur altíð dámað væl kreativt arbeiði og tískil hevur eisini dámt henni væl at teknað. Hon málaði teir fyrstu málningarnar fyrst í nítiárunum.

- Eg byrjaði við oljumáling, men máli nú við acryl. Havi eisini roynt meg við akvarell, sigur hon.

Hóast flestu málningarnir á framsýningini á Strondum eru natúralistiskir, dámar Ketty væl at mála abstrakt.

- Mær dámar faktisk betur at mála abstrakt, tí tað er so spennandi at arbeiða við litum. Hinvegin selja abstraktu motivini ikki so væl sum hini. Tó haldi eg, at nógv ung dáma væl teir abstraktu málningarnar, sigur hon.

Ketty hevur gingið einar tríggjar fylgjandi vetrar á kvøldskúla hjá Jóannes S. Hansen, og her hevur hon fingið væl burtur úr.

### Eggja øðrum

Ketty sigur, at ein orsøk til, at hon hevði hug at hava hesa framsýning á Strondum, er, at hetta er ikki vanligt á vestara armi á Skálafjørðinum.

- Eg helt, hetta vera áhugavert, og kundi tiltakið eggjað øðrum ungum málarum at sýna fram hesumegin fjørðin – ella bara verið ein íblástur og spíri til at fara at mála - hevði tað verið gott.

Listakvinnan sigur, at tað er ikki av tilvild, at hon í stóran mun hevur valt at málað fjøruna og bygdaløg á Strondum til hesa framsýning.

- Vit síggja so fáar málningar hiðani úr kommununi, og tí helt eg, at lokalu motivini kundu havt áhuga hjá fólki hesumegin Skálafjørðin, sigur hon.

Ketty á Fríðriksmørk er útbúgvin hárfríðkanarkvinna, men hon er allergisk yvirfyri litunum, sum brúktir vera í liting.

- Tí klippi eg bara í dag - og liti ikki, ikki uttan í fríløtunum, tá ið eg máli, sigur listakvinnan á Strondum.

Allir málningarnir – eisini teir, sum eru seldir – vera hangandi í Føroya Banka, so leingi framsýningin varar.





# Kuldi drepur laks í USA og Kanada

**Fram við kanadisku strondini hevur verið bítandi kalt í vetur, og veðurmátingar hava mált heilt niður í 40 kuldastig**

USA/ KANADA
*Vilmund Jacobsen*

Tann nógvi kuldin fram við eysturstrondini av Norður-Ameriku og Kanada í vetur hevur elvt til stórar trupulleikar hjá alarum á leiðini.

Hetta veit internettænastan, The Wave, at siga.

Har kaldast hevur verið við kanadisku strendurnar, eru máld heilt niður í 40 kuldastig.

Avleiðingin hevur verið, at alifiskur er deyður í ringunum hjá fleiri alarum.

### Norðmenn raktir

Eitt norskt felag, sum hevur sítt virksemi útfyri strondini í statinum, Maine í USA, hevur eisini mist laks av tí nógva kuldanum.

Kavaódnir hava eisini ført til nógvar seinkingar í USA og Kanada.

# Spermur í haganum

**Ein spermur, sum rak deyður inn í Oslofjørðin, fer nú at prýða hagan í Fredrikstad í Noregi**

NOREG
*Vilmund Jacobsen*

Herfyri rak ein 14 metrar langur og 28 tons tungur deyður spermur inn í Oslofjørðin í Noregi.

Norðmenn vildu ikki lata hvalin fara fyri einki. Teir avgjørdu tí at taka hann uppá turt við einum stórum krana og leggja hann í hagan, so fólk kunnu síggja, hvussu beinagrindin av einum stórhvali sær út.

Illa ber til at lata eitt slíkt djór, sum vigar 28 tons, liggja í haganum og rotna. Tað hevði tikið alt ov langa tíð og hevði neyvan verið so tespiligt heldur, nú summarið stundar til. Tí noyddust teir, sum vildu varðveita beinagrindina, undir at skera spik og tvøst oman av sperminum.

Teir, sum tóku stig til at varðveita beinagrindina, roknaðu við at skula skera spikið og tvøstið í einar 500 bitar, sum viga eini 100 pund hvør.

Bara hjartað á hvalinum vigar eini 600 pund!

### Forkunnugt ferðamál

Spermurin fer nú at prýða hagan í Fredrikstad, og lítið man vera at ivast í, at hetta verður eitt forkunnugt ferðamál, sum tíðin líður.

Vísundamenn rokna við, at einir 5.000 spermar eru í norskum sjógvi um summarið. Hvalurin hevur verið friðaður seinastu 20 árini.

Størsti hann-hvalurin millum spermar, vigar eini 57 tons og gerst einar 20 metrar langur.

Spermurin, sum nú liggur í haganum í Fredrikstad, er ein ungur hann-hvalur, sum ikki er fullvaksin.